# Breið grundvitan í psykiatri

**Herfyri vóru um hálvthundrað fólk samlað á Landssjúkrahúsinum til eitt grundskeið í psykiatri, sum Psykiatriski Depilin skipaði fyri.**

**Luttakarar vóru fakfólk, sum á ymsum økjum arbeiða við fólki, ið hava sálarligar trupulleikar**

PSYKIATRI
*Snorri Brend*



*Tey høvdu bert væntað 50, men tá avtornaði boðaðu 100 fólk frá luttøku til skeiðið. Her síggjast tveir teirra*

**Havn:** Psykiatriski depilin arbeiðir við ymiskum tiltøkum fyri at menna fakligu vitanina hjá starvsfólkunum.

Eitt av hesum tiltøkum er at skipa fyri grundskeiðum og eftirútbúgvingum í psykiatri.

Líknandi grundskeið hevur verið hildið áður, men var tað tá við útlendskum fyrilestrarhaldarum. Hesaferð vóru allir undirvísararnir fólk ið starvast á psykiatriska deplinum.

Skeiðið vardi alla vikuna og skráin var fjølbroytt og umfatandi. Endamálið var at geva luttakarunum eina breiða grundvitan, og samstundis at virka sum ástøðiligt "brush-up" fyri tey, sum hava arbeitt innan fakið eina tíð.

Áhugin fyri at luttaka á skeiðnum var rættuliga stórur.

- Vit høvdu væntað eini 40-50 luttakarar, men tá tilmeldingarfreistin var úti, høvdu um 100 fólk meldað seg til, siga fyrireikararnir.

Avgjørt var tí at skipa fyri tveimum grundskeiðum, har tað fyrra hevur verið og seinna skeiðið av sama slagi verður hildið um miðjan juni.

**Høvuðsevnini á skeiðnum vóru hesi:**

- psykiatrisk hugsan og viðgerð í søguligum ljósi
- lívfrøðiligir, sálarfrøðiligir og sosialpsykiatriskir viðgerðarhættir
- diagnosteringsskipanir við høvuðsdenti á ICD-10
- psykotisk eyðkenni
- skizofreni
- persónsmenskutrupulleikar
- affektivir trupulleikar
- nervaveikindi, OCD, angist
- psykiatrisk rehabilitering
- dupultdiagnosur
- børn og ung við psykiatriskum trupulleikum


